# Símun verður hjálparvenjari

**Í gjár gjørdist tað greitt, at Símun Eliasen komandi kappingarár verður leikandi hjálparvenjari hjá barndómsfelagnum ÍF**

FÓTBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið fekk ÍF ein týðandi part av sínum leikarahópi til komandi kappingarár upp á pláss, og fleiri av lyklaleikarunum skrivaðu undir nýggjan sáttmála. Ein teirra, Símun Eliasen, skrivaði samstundis undir sum leikandi hjálparvenjari.

## Ein góð stamma

Teir spælararnir, sum um vikuskiftið skrivaðu undir við ÍF, eru brøðurnir Símun og Hanus Eliasen, miðvallarin Høgni Zachariassen og verjuleikarin Bartal Eliasen. Sum skilst hevur áhugi verið fyri hesum spælarum úr øðrum feløgum, men teir valdu so allir fýra at halda fram í barndómsfelagnum.

Sum nakað nýtt hevur ÍF komandi kappingarár tveir hjálparvenjarar. Umframt Símun Eliasen er Jón Simonsen settur sum hjálparvenjari, men enn er ikki endaliga avgreitt, hvussu arbeiðsbýti verður teirra millum saman við venjaranum Petur Simonsen.




*Sum skilst hava fleiri feløg víst Símun Eliasen áhuga, men fuglfirðingurin valdi at halda fram í barndómsfelagnum, har hann nú skal royna seg sum leikandi hjálparvenjari.*
*Mynd: www.if.fo*

## Ungarskur áleypari skal royndarvenjari

Nú tað er greitt, at Sylla komandi kappingarár ikki verður í Fuglafirði, og at tað er sannlíkt, at Gunnar Nielsen heldur ikki verður við ÍF, leita fuglfirðingar sær eftir álopsstyrki.

Hesin styrkur kemur møguliga úr Ungarn, tí fyrst í komandi ári kemur ein ungarskur áleypari at royndarvenja við fuglfirðingum. Talan er um ein 23 ára gamlan leikara, ið millum annað hevur spælt á ungarska U-21 landsliðnum, og sum hevur spælt í bestu ungarsku deildini.

# Jovevic til ÍF

**Fuglfirðingar hava mist nakað av fólkinum, sum teir høvdu farna kappingarár, og tí er tilgongdin av jugoslaviska miðvallaranum, Alexander Jovevic úr TB, kærkomin**

LEIKARASKIFTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sunnudagin skrivaðu ÍF og Alexander Jovevic undir eitt-ára sáttmála, soleiðis at jugoslavin komandi kappingarár skal styrkja um liðið hjá fuglfirðingum.

## Fjórða liðið í fýra ár

Komandi kappingarár verður tað fjórða kappingarárið hjá Jovevic í Føroyum, og ÍF verður samstundis tað fjórða liðið hjá honum hesi fýra árini. Tá ið Alexander Jovevic á fyrsta sinni royndi seg her á landi, var tað á Skála, og síðani hevur leiðin gingið til NSÍ í Runavík og TB á Tvøroyri, og næsti steðgur hjá honum á ferðini verður altso ÍF í Fuglafirði.




*Sunnudagin gjørdist tað greitt, at Alexander Jovevic komandi kappingarár verður at síggja í reyða búnanum hjá ÍF.*
*Mynd: www.if.fo*

Fuglfirðingar hava mist nakað av fólki undan komandi kappingarári. Rúni Elttør fer at spæla við FS Vágum, og vandamikli áleyparin Sylla hevur gjørt sáttmála við føroyameistararnar úr B36. Tað er tí ikki óhugsandi, at Alexander Jovevic ikki verður einasti nýggi spælarin hjá ÍF.


## Roknskaparfólk

TEAM85

Vit leita eftir einum skilafólki til at røkja og skipa roknskaparviðurskifti okkara. Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt eftir avtalu.

Bókhaldarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran og hevur ábyrgdina av at dagliga arbeiðið viðvíkjandi bókhaldi og roknskapi verður dagført. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eisini um viðlíkahald og menning av mannagongdum í Auto Service Pf..

Vit ímynda okkum, at tú hevur royndir, ert fyrikomandi og tekur arbeiðið í álvara.

At vera roknskaparfólk hjá okkum er líka so mennandi og spennandi, sum tú gert tað til. Harvið meina vit, at tað hevur alstóran týdning, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og kanst hava tamarhald á fleiri uppgávum samstundis.

Tú fært rættiligar fríar hendur at laga arbeiðsdagin og mest sannlíkt verður tú ein teirra, ið best veit, hvussu vit hava tað.

Hevur tú spurningar til starvið, ert tú vælkomin at ringja til Árna Rasmussen á tlf. 345 400. Umsóknir, ið skulu verða okkum í hendi innan 1. desember, skulu sendast til:

**Auto Service P/F**
**Árni Rasmussen**
**undir Krákugjógv**
**100 Tórshavn**

Auto Service telist millum størstu bilasølur í landinum og umboðar bilamerkini Peugeot, Nissan, Saab og Opel

OPEL
PEUGEOT
NISSAN
SAAB



undir Krákugjógv tel. 345400 **Auto Service**






Kánus er nú í handlunum!

Stuttligasta spurningaspælið, sum er komið á føroyskum.
Undirhald og spenningur við spurningum um alla ta vitan, sum goymir seg í okkara dagliga máli.

Statt ikki sum Kánus, men keyp spælið nú!
Kánus fæst í hesum handlum:

**550,- kr.**

SISERO 351800

Keypssamtøkurnar kring landið
Bókasølan og Griffilin í SMS
BR Leikur
Thomas Dam á Hálsi
H. N. Jacobsens Bókhandil
Hjalmar Jacobsens Bókhandil

Leikalund, Klaksvík
Alfa Bókhandli, Klaksvík
Leikabúðin, Saltangará
Fa. Ellen Dahl, Vágur
Karl Jespersen, Tvøroyri

ATLANTIC AIRWAYS www.fk.fo REYNI SERVICE SKIPAFELAGIÐ